## FM í skjótum triathlon

Sunnudagin verður kappast um føroyameistaraheitið í Sprint triathlon, tey kalla. Kappingin verður í Havn og byrjar kl. 13.00. Tá kappast verður í Sprint Triathlon verður fyrst svomið 750 metrar, síðan verður súkklað 20 kilometrar og at enda runnið 5 kilometrar. Súkklað verður millum rundkoyringina við R.C. Effersøesgøtu og rundkoyringina við Skansan. Koyrt verður framvið strond og teinurin verður koyrdur tríggjar ferðir. Runnið verður á økinum við Plantusøluna. Teinurin er uml. 1 km langur, og verður runnin seks ferðir.

## Pál vann gull í Suðurafrika



Pál Joensen vann í gjárkvøldið gull í 800 metra frísvimjingini á suðurafrikansku meistarastevnuni í Durban. Páll var 10 sekund frammanfyri næstabesta svimjaran. Svimjing.com skrivar, at tíðin hjá Pál Joensen var eitt sindur frá føroyska metinum hjá honum, sum er 7:54.40 frá DM í Esbjerg í fjør, men tó so ein sterk tíð, um samanborðið verður við hvussu restin av heimselituni hjá serliga monnum svimur, nú superdraktirnar eru burtur. Almenna tíðin hjá Pál í kvøld var 7:58.95. Pál Joensen hevur eina kapping eftir at svimja í Suðurafrika, og hon er á 1500 metra teininum. Finalan í hesi kapping verður leygardagin.

# Trýstið liggur á NSÍ

**VODAFONEUPPTAKT** Eitt stig eftir tríggjar dystir er upp á ongan máta nøktandi í Runavík. Tí liggur stóra trýstið hetta umfarið á NSÍ, tá teir vitja hjá ósigraðu HB í Gundadali



Rólant Waag Dam

Ikki bara í Runavík, men kring alt landið eru fólk bilsin um, at støðan við Løkin ikki er betri enn tað sama. Sjálvandi er kappingarárið framvegis ungt, 24 dystir eru eftir at spæla, bólturin er rundur og alt hetta her, men eitt stig eftir tríggjar dystir – tveir á heimavølli og ein á útivølli móti uppflytarunum í Suðuroy – er yvirhøvur ikki tað, Pauli Poulsen og hinir í NSÍ høvdu ætlað sær. Við søguna hoyrir tó, at tey í Runavík upp á ongan máta fingu hjálp frá dómaranum í teimum báðum fyrstu umførunum.

Dómarahjálp ella ikki, undan fjórða umfari hevur tað ikki eydnast NSÍ at vunnið, ella tíansheldur skorað meira enn eitt mál í einum dysti, uttan at lata minst eitt fara í gjøgnum.

Henda gongd skal helst broytast í morgin – eisini hóast mótstøðuliðið er HB og leikstaðið er Gundadalur, har fá lið hava tað lætt. Seinast NSÍ vitjaði í Gundadali, var miðskeiðis í junimánaði í fjør. Tá vann HB einki minni enn 5-2. Og tað var eisini HB, sum hevði takið á NSÍ, tí ein annan dystin í Runavík vunnu teir við tveimum málum móti ongum, meðan NSÍ vann fyrsta dystin teirra millum 2-1.

### Næstan allir klárir

Venjararnir báðir hava so at siga optimalar fortreytir, tá tað kemur til leikararnar. Hjá heimaliðnum verður Vagnur Mohr Mortensen eftir øllum at døma ikki við, meðan Andrew av Fløtum helst verður klárur sunnudagin. Hann varð skiftur út í dystinum móti AB, men í HB rokna tey við honum.

Hjá NSÍ er ikki so nóg at tosa um í so máta. Allir mans eru klárir at spæla. Stóri spurningurin er so, um allir mans eru klárir at vinna dystin.

*rolant@sosialurin.fo*

## Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 3 | 3 | 0 | 0 | 8 | 2 | +6 | 9 |
| 2 | Víkingur | 3 | 2 | 1 | 0 | 7 | 3 | +4 | 7 |
| 3 | B68 | 3 | 2 | 0 | 1 | 7 | 3 | +4 | 6 |
| 4 | HB | 3 | 1 | 2 | 0 | 6 | 5 | +1 | 5 |
| 5 | EB/Streymur | 3 | 1 | 1 | 1 | 4 | 3 | +1 | 4 |
| 6 | ÍF | 3 | 1 | 1 | 1 | 3 | 3 | 0 | 4 |
| 7 | FC Suðuroy | 3 | 0 | 2 | 1 | 5 | 7 | -2 | 2 |
| 8 | AB | 3 | 0 | 1 | 2 | 7 | 10 | -3 | 1 |
| 9 | NSÍ | 3 | 0 | 1 | 2 | 2 | 5 | -3 | 1 |
| 10 | B71 | 3 | 0 | 1 | 2 | 3 | 11 | -8 | 1 |

## Føroyska 1. Deild *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB II | 2 | 2 | 0 | 0 | 6 | 1 | +5 | 6 |
| 2 | Víkingur II | 2 | 1 | 1 | 0 | 7 | 3 | +4 | 4 |
| 3 | KÍ | 2 | 1 | 1 | 0 | 3 | 1 | +2 | 4 |
| 4 | 07 Vestur | 2 | 1 | 1 | 0 | 2 | 1 | +1 | 4 |
| 5 | TB | 2 | 1 | 0 | 1 | 4 | 3 | +1 | 3 |
| 6 | EB/Streymur II | 2 | 1 | 0 | 1 | 2 | 3 | -1 | 3 |
| 7 | NSÍ II | 2 | 0 | 2 | 0 | 2 | 2 | 0 | 2 |
| 8 | FC Hoyvík | 2 | 0 | 1 | 1 | 2 | 3 | -1 | 1 |
| 9 | AB II | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 | 5 | -5 | 0 |
| 10 | B68 II | 2 | 0 | 0 | 2 | 1 | 7 | -6 | 0 |

## Føroyska 1. Deild *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 3 | 3 | 0 | 0 | 19 | 0 | +19 | 9 |
| 2 | AB | 3 | 2 | 0 | 1 | 20 | 3 | +17 | 6 |
| 3 | Skála | 2 | 2 | 0 | 0 | 8 | 3 | +5 | 6 |
| 4 | Víkingur | 3 | 1 | 0 | 2 | 4 | 5 | -1 | 3 |
| 5 | EB/Streymur | 2 | 0 | 0 | 2 | 0 | 9 | -9 | 0 |
| 6 | MB | 3 | 0 | 0 | 3 | 1 | 32 | -31 | 0 |

## Dystir um vikuskiftið

**Vodafonedeildin**
16/04 Víkingur - EB/Str.
18/04 HB - NSÍ
18/04 ÍF - B71
18/04 FC Suðuroy - B68
18/04 AB - B36

**1. deild, menn**
17/04 TB - EB/Streymur
17/04 KÍ - HB
17/04 07 Vestur - AB
17/04 Vík. - FC Hoyvík
17/04 B68 - NSÍ

**1. deild, kvinnur**
18/04 KÍ - Skála
18/04 AB - Víkingur
18/04 MB - EB/Streymur

# Nú skal KÍ vísa seg

**1. DEILD UPPTAKT** KÍ skal um vikuskiftið vísa, at liðið veruliga ætlar sær uppflyting til bestu deildina. KÍ fær vitjan av oddaliðnum HB

Rólant Waag Dam

Klaksvíkingar, sum fyri fyrstu ferð nakrantíð, spæla við sínum besta liði í næstbestu fótbóltsdeildini, hava fingið fýra stig fyri tveir teir fyrstu dystirnar í kappingini í ár.

Nú bíðar stóra uppgávan ímóti oddaliðnum í 1. Deild, HB, sum er einasta liðið við fullum stigatali eftir fyrstu tvey umførini.

HB setti seinast TB upp á pláss, og nú fáa klaksvíkingar høvi at vísa, um teir veruliga ætla sær uppflyting til bestu deildina í ár. Dysturin millum KÍ og HB verður spældur í Klaksvík leygardagin klokkan 15.00.

TB fær hetta vikuskiftið vitjan av EB/Streymi, 07Vestur spælir ímóti AB á heimavølli, og FC Hoyvík skal vitja hjá Víkingi. Seinasti dysturin er ímillum grannarnar B68 og NSÍ.

*rolant@sosialurin.fo*

## Danska SAS-Ligaen

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | MÁL | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FC København | 27 | 17 | 5 | 5 | 48-16 | 56 |
| 2 | OB | 27 | 13 | 8 | 6 | 37-27 | 47 |
| 3 | AaB | 27 | 12 | 7 | 8 | 32-21 | 43 |
| 4 | Esbjerg fB | 27 | 11 | 8 | 8 | 38-37 | 41 |
| 5 | FC Midtjylland | 27 | 12 | 5 | 10 | 35-36 | 41 |
| 6 | Silkeborg | 27 | 11 | 7 | 9 | 43-35 | 40 |
| 7 | Brøndby IF | 27 | 11 | 6 | 10 | 46-44 | 39 |
| 8 | FC Nordsjælland | 27 | 10 | 5 | 12 | 28-32 | 35 |
| 9 | SønderjyskE | 27 | 8 | 8 | 11 | 25-29 | 32 |
| 10 | AGF | 27 | 8 | 8 | 11 | 30-37 | 32 |
| 11 | Randers FC | 27 | 6 | 9 | 12 | 26-37 | 27 |
| 12 | HB Køge | 27 | 2 | 6 | 19 | 24-61 | 12 |

***Føroyskir leikarir:*** *Christian Lamhauge Holst (Silkeborg)*